# Eg eri til reiðar! Ert tú?

**Tá tú skalt seta krossin, kanst tú gera sum tú vilt - har er eingin annar uttan tú. Spurningurin er bara, hvat tú vilt!**

Støðan er í løtuni tann, at...
- landskassin er tómur
- eldraøkið er forsømt
- skattatrýstið setir met
- almannaverkið bólgnar
- ríkisveitingin er skerd
- heilsuverkið haltar
- vælferðin er viknað



Er tað soleiðis, tú vilt hava tað, skalt tú bara lata standa til. Fullveldisflokkarnir lova, at sama skilið heldur fram, sleppa teir aftur til valdið.

Vilt tú hinvegin hava vend í, so vit aftur kunnu byggja landið og menna vælferðina, eigur tú at seta ein sambandskross á atkvøðuseðilin.

Sambandsflokkurin er til reiðar at smoyggja upp um armar, so ruddast kann upp og byrjast av nýggjum - ongantíð ov skjótt!

**Heðin Mortensen, løgtingsmaður**
valevni Sambandsflokksins í Suðurstreymoy

**HEÐIN MORTENSEN**
www.hedinmortensen.com



# Familjan

Børnini eru okkara felags framtíð og tí er avgerandi neyðugt at barnafamiljur fáa góð kor at liva undir. Vit hava fimm ítøkilig uppskot:

## Systkinaavsláttur

Avsláttur, tá ið tvey ella fleiri børn eru í ansing.

## Bíligari mjólk

Vit fara at lækka prísin á einum mjólkapakka við tveimum krónum. Hetta ger tað lættari hjá familjum at seta mjólkina á borðið.

## Matskipan í skúlunum

Vit fara at seta á stovn matskipan í skúlunum. Næmingarnir skulu hava eitt sunt, ókeypis máltíð hvønn dag. Hetta bøtir um innlæringarføri hjá børnunum, samstundis sum tey læra at eta góðan mat.

## Smidligari barsilsskipan

Barsilsskipanin skal tryggjast. Skipanin skal gerast smidligari og tillagast tørvin hjá einstøku familjuni.

## Lættari at seta búgv

Tað skal verða lættari hjá ungum familjum at seta búgv. Alternativ bústaðarbygging skal stimbrast við broytingum í rentustuðuls- og mvg-lógum.



**JAVNAÐARFLOKKURIN**
*- nakað fyri C*